tíðindablaðið sosialurin
Internet: www.sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
**Marknaðardeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dánjal Højgaard, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Høgni Mohr
**Ítróttur:** Jákup Mørk
**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin
**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir
**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820
**Telefax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Lýsingar:** lysing@sosialurin.fo
**Prent:** Sosialurin

# Mannaættarinnar tørsti skamblettur

## *Oddagrein*

ALTJÓÐA mannarættindafelagsskapurin Amnesty International hevur heitt á ST um á ákæra USA fyri brot á mannarættindini. Í fleiri amerikonskum býum hevur løgreglan pínt ella dripið svørt, sum vórðu óvápnað. Løgregluharðskapur móti ósekum sivilum er vorðið gerandiskostur. Tað er ikki sørt av lagnunnar speisemi, at USA sum hevur átikið sær leiklutin sum altjóða politist, nú verður ákært fyri at hava eina løgreglu, ið fremur harðskap móti ósekum.

HÓAST hetta ikki er nakað nýtt, so er tað skelkandi at hoyra, at nettupp tað landið, sum so mong av okkum síggja upp til og sum eisini hevur valt at prýða seg við heitinum „Gods own country“ skal vera tað landið í sokallaða siviliseraða heiminum sum ber seg mest ósiviliserað at. Vit hava fleiri ferðir víst á, hvussu USA brýtur mannarætindini við at taka fólk av døgum. Deyðarevsing er ikki sambarilig við eitt nútímans siviliserað samfelag. Kortini eru vit vitni til, at statir í USA í støðugt størri mun taka fólk av døgum. Í hevnisøku verða miðaldarmetodur brúktar, hóast hagtøl vísa, at deyðarevsing loysir ikki trupulleikarnar, sum eitt nú vaksandi kriminalitetur hevur við sær.

FORSETAVAL verður í USA um ikki so langa tíð. Mangt bendir á, at republikanska valevnið, Bush verður valt. Um so hendir er tað enn eitt afturstig fyri mannarættindini, tí fáur hevur sum Bush gingið inn fyri deyðarevsingini. Og nú um dagarnar frættist, at sami Bush hevur sínar trúgvastu viðhaldsmenn millum tey, sum stríðast fyri at varðveita rættin hjá borgarunum at bera vápn. Nettup hesin óskerdi rættur er við til at kriminalisera USA enn meira. Er við til at halda deyðarevsingini á lívi. Tá samanumkemur heldur tað lív í blómandi vápnaídnaðinum.

TAÐ lovar so sanniliga ikki gott, at republikanarin Bush stendur til at vinna komandi forsetaval í USA. Verða mannarættindafelagsskapir í dag ikki hoyrdir í nóg stóran millum í USA, so er orsøk til at bera ótta fyri, at støðan bara verður uppaftur verri, tá ein nýggjur Bush aftur situr við valdinum. Tí er tað so mikið meira átrokandi, at arbeiðið hjá Amnesty verður hoyrt og stuðlað. At eitt nú lond í Europa gera amerikonskum myndugleikum varugar við mótstøðu sína ímóti deyðarevsing og politiharðskapi. At vælferðarsamfelagið USA, ið metir seg sum vøgga demokratisins og hevur átikið sær leiklutin sum heimsins politi, hevur deyðarevsing fremst í skøldri sínum er mannaættarinnar størsti skamblettur.

***Sosialurin***

## Lesarabrøv:

# Hvør er ræðumyndin?

Orðið ”ræðumynd” hevur verið nógv nýtt, síðani sitandi loysingarsomgonga varð skipað. Í nærum hvørjari blaðgrein, sum hesir loysingarmenn hava latið av hondum, hevur verið víst á, at atfinningarnar frá andstøðuni eru bert ræðumyndir, og tí einki hava við veruleikan at gera.

Orsøkin til hetta er helst tann, at loysingarflokkarnir hava ilt við at afturvísa nakað av tí, sum andstøðuflokkarnir koma við. Tað skal eisini sigast andstøðuflokkunum til rós, at teir hava staðið seg væl í kjakinum, sum hevur verið í kjalarvørrinum av samráðingarferðunum hjá landsstýrinum.

Nú tykjast aftur nýggir tónar at ljóða frá hesum somu loysingarflokkum, tí teirra heimaarbeiði hevur kortini ikki verið nóg gott. Teir fingu at vita í góðari tíð, at skiftistíðin fór bert at vera 3 til 4 ár, og tí átti ein endurtøka av hesum, ikki at komið óvart á nakran.

Men tað er sum um at landsstýrið aftur her sær trøll (ella ræðumyndir) á alljósum degi, tí nú verður tosað um at útseta gildiskomuna fyri loysingina.

Men hvat sigur veljarin ? Tíðin fer at nærkast, til vit skulu hava fólkaatkvøðu, og



øllum er greitt, at tað kostar at loysa frá Danmark. Tí eru fólk vorðin bangin fyri tí, sum fer at henda.

Tað var ein lætti at hoyra frá seinastu veljarakanningini, at tveir av loysingarflokkunum vóru fyri álvarsligum bakkasti. Fólkið er rættiliga farið at hugsa og síggja, hvussu leikur fer.

Mær tykir at orðið ”ræðumynd”, sum loysingarflokkarnir hava nýtt ímóti andstøðuni, nú er við at fella á teir sjálvar.

Í dag eru loysingarflokkarnir stórsta ”ræðumyndin”, og tí tinnist veljaraskarin í ávísum flokkum. Alt talar fyri, at Sjálvstýrisflokkurin bløðir út av hesi omanfyri nevndu ”ræðumynd”.

**Andras Miðskarð**

# Tórshavnar Manskór til kórolympiadu

Tórshavnar Manskór fer í summar til Eysturríkis at taka lut í kórolympiadu, ið er tann fyrsta av sínum slagi nakrantíð.

Við sær at framføra hava teir m.a. nýtt kórverk kallað "Vetrarkæti", sum kórleiðarin Bjarni Restorff hevur skrivað, og sum Hanus Andreasen hevur skrivað tekst til.

Kórið hevur verið á nøkrum konsertferðum, og leitar aftur út í heim í summar. Kórið fer í juli til Danmarkar, har tað hevur samband við eitt manskór á Fjóni. Eftir at hava sungið á Fjóni gongur leiðin til Svøríkis og at enda til Linz í Eysturríki, har luttøka í fyrstu kórolympiadu nakrantíð er á skránni.



**Kórolympiadan stórt tiltak**

Kórolympiadan er sera stórt tiltak. Higartil eru uml. 360 kór úr uml. 80 londum runt allan heimin tilmeldaði. Væntandi verða á leið 8-9000 sangarar í Linz hesar dagarnar. Aftrat hesum talinum koma vónandi nógvir áhoyrarar.

Her fer kórið at kappast ímóti 10-15 øðrum manskórum úr øllum heiminum, sum eru á stødd við Tórshavnar Manskór.

- Hetta er sjálvandi stór avbjóðing at seta sær listarliga, men uttan støðugar avbjóðingar kemst ikki víðari, sigur nevndin í kórinum.

**Umboða Føroyar**

Greitt er, at kórið á tílíkari ferð umboðar almennu føroysku tjóðina, umframt høvuðsstaðin Tórshavn, ið manskórið ber navnið eftir.

- Á tílíkari ferð er sjálvandi eisini møguleiki at føra lýsingarherferð fyri Føroyar, og hetta hava fleiri fyritøkur tikið til sín og lýst í lýsingarfaldara, sum kórið letur gera; tí sum áður nevnt er kontaktflatin stórur við tílíkt tiltak. Talan er sostatt um framtak á nógvum økjum, sigur nevndin at enda í tíðindaskrivi.

Fyri at hjálpa um fíggingina av ferðini verður skipað fyri dansitiltaki í Sjónleikarhúsinum leygarkvøldið 13 mai kl. 23.00-03.30, har teir vælkendu Julianneboys fáa alt at svinga við góðum dansitónleiki, ið vendir sær til allar aldursbólkar millum 20 og 80 ár.

Høvið verður eisini at keypa sær okkurt til matna, og okkurt at leska sær við.

# Alt í Kristi

Hetta er heitið á árliga Ársmøtinum hjá Kirkjuligu Heimamissiónini í Føroyum, sum byrjar hósdagin 18. mai og heldur fram til sunnudagin 21. mai.

Ársmøtið hjá Heimamissiónini verður aftur á skránni í ár. Tað byrjar 18. mai og heldur fram til 21. mai, 4 dagar. Evnið hesaferð er: Alt í Kristi!

Heimamissiónsfólk úr øllum Føroyum koma saman í Leguhúsinum í Nesvík einaferð um árið til ársmøti. Komið verður saman til fundar, har ið ymisk viðurskifti innan Heimamissiónina verða kunngjørd og viðgjørd. Fýra uppbyggjandi fundardagar saman við vinum og kenningum, og ikki minst brøðrum og systrum í Harranum.

At vera við til ársmøti, er nakað, sum átti at ligið nær hjá einum og hvørjum heimamissiónsfólki. Tí at tað er veruliga uppbyggjandi fyri tað kristna menniskjað at vera við til hesar fundir, samstundis sum tann einstaki fær eina betri mynd av, hvat Heimamissiónin er, hvat hon ger o.s.fr.. Ein sær, hvat ein er partur av. Tað er hugaligt.

Sum sagt, er heitið á Ársmøtinum í ár: **Alt í Kristi!** Hvat er meira týdningarmikið enn júst tað. Hvat hevði eitt ársmøti verið uttan so, at hetta var nakað, dentur varð lagdur á hjá tí einstaka? Vit savnast jú um Kristus Jesus, júst sum fólk í 2000 ár hava gjørt. Ápostlarnir á sinni savnaðust um Jesunavnið og fyri teir var Kristus jú alt. Og teir samgleddust um júst hetta sama: Alt í Kristi!

Hetta verður so tað, sum vit aftur í ár koma at savnast um. Eisini kemur hetta at verða evnið um nógv av tí, sum skal verða sagt á Ársmøtinum.

So latum okkum seta hvør øðrum stevnu í Nesvík 18. til 21. mai!

Ársmøtifaldarin er komin út við øllum viðkomandi upplýsingum á, samstundis sum Trúboðin, blaðið hjá Heimamissiónini júst er komið út til hvørt húski. Í tí Trúboðanum sæst skráin fyri Ársmøtið í ár.

Tú kanst bíleggja tær pláss og kost, við at ringja til HM-skrivstovuna í Nesvík á tel. 42 25 33 millum kl. 13 og 17 ella skriva tilmelding til fax 42 25 44. Eisini ber til at senda t-bræv til: hm@post.olivant.fo

Seinasta freist at tekna seg til ársmøtið er mánadagin 15. mai.

**TØKK**

Hjartaliga takk fyri sýnda samkenslu og góða hjálp, tá okkara kæri

**ÓLAVUR PATURSSON**

doyði og varð jarðaður.

**Páll Gazet, Bogi, Dorthea, Bodil og systkin**





# Strandferðslan kann vænta harða kapping

*Eimskip fer í september, tá saltsøla teirra í Runavík letur upp, undir egna farmaleið kring oyggjarnar við salti. Men tað er ikki óhugsandi, at felagið eisini fer at flyta annan farm*

JOHN JOHANNESSEN

Tá nýggja saltmiðstøðin hjá Eimskip letur upp í Runavík í september, fer Eimskip sjálvt at flyta farm millum oyggjarnar í Føroyum.

Íslendska reiðaríið fer fyrst og fremst at leggja seg eftir at flyta sítt egna salt út um landið, men Svavar Óttoson, fyrrverandi stjóri í Eimskip í Føroyum, sigur, at møguleiki er fyri, at felagið eisini fer at flyta annan farm.

Ætlanin er, at Eimskip sjálvt skal syrgja fyri, at saltið verður flutt við bili og skipi kring landið. Tí er eisini møguleiki at nýta flutningstólini at flyta annan farm.

**Nýta smærri farmaskip**

Svavar Óttoson sigur, at Eimskip enn ikki hevur funnið nakað skip at flyta salt og annan farm kring landið við, men arbeitt verður við málinum. Ætlanin er, at talan skal vera um smærri bílig skip, ið fyrst og fremst eru væl egnað til at føra salt við.

– Í fyrstu atløgu leggja vit dent á at flyta saltið, men tað ber jú ikki til at siga, hvat næsta útspæl verður, sigur Svavar Óttoson. Hann vil ikki siga stórt meira um ítøkiligu ætlanirnar um at flyta farm innanoyggja í Føroyum enn.

Tó er greitt, at tað ikki kann væntast, at Eimskip fer undir eina farmaleið við lastbilum, eins og Strandfaraskip Landsins. Hesa uppgávuna røkir lastbilafelagið hjá Hera Thomsen fyri Eimskip, og skal hetta samstarvið halda fram.

**Gott samstarv við SL**

Eimskip hevur sum er gott samstarv við Strandfaraskip Landsins, og flytur Eimskip eisini væl av farmi gjøgnum kervið hjá føroyska felagnum.

Men salt er ein ógvuliga bílig vøra, sum kortini fyllir nógv og tískil kostar nógv at flyta gjøgnum flutningskervið hjá Strandfaraskipum Landsins. Tí hevur Eimskip sett sær fyri at finna eina bíligari loysn.

Heini á Borg, leiðari á farmadeildini hjá Strandfaraskipum Landsins, sigur seg ikki kenna ítøkiligu ætlanirnar hjá Eimskip, og tí er torført hjá honum at svara, um Starndfaraskip Landsins fara at missa pening av nýggju farmaleiðini.

Kortini vísir Heini á Borg á, at tað mest verður á leiðini til Suðuroyar, at tað fer at merkjast, um Eimskip fer at flyta farm í Føroyum. Einasta leiðin, Strandfaraskip Landsins flytur bingjur fyri Eimskip, er Suðuroyarleiðin. Á hinum leiðunum flytur Strandfaraskip Landsins mest smágóðs fyri Eimskip.

# Nýggjur umboðsmaður í Brússel

*Í november tekur Hákun J. Djurhuus við starvinum sum føroyskur umboðsmaður í Brússel. Hann tekur við eftir Esther Dahl, sum hevur verið í starvinum í tvey ár*

JOHN JOHANNESSEN

Fyrsta november fáa føroyingar nýggjan umboðsmann í Brússel. Talan er um Hákun J. Djurhuus, sum seinastu árini hevur starvast sum embætismaður í uttanlandsdeildini í Tinganesi.

Esther Dahl, sum í 1998 varð sett sum tann fyrsti føroyski umboðsmaðurin í Brússel, hevur skjótt verið í starvinum í tvey ár, og er hetta eisini júst orsøkin til, at hon nú fer úr starvinum.

Herluf Sigvaldsson, stjóri á uttanlandsdeildini, sigur tað vera vanliga mannagongd aðrastaðir í heiminum, at umboðsfólk verða skift út, eftir at tey hava sitið í starvinum í tvey ár. Hesar mannagongdir ætlar uttanlandsdeildin í Tinganesi eisini at halda seg til.

Tá Hákun J. Djurhuus tekur yvir starvið hjá Esther Dahl í Brússel í november, tekur Esther Dahl yvir tað starvið, Hákun J. Djurhuus fyrr hevur røkt á uttanlandsdeildini í Tinganesi. Hetta heldur Herluf Sigvaldsson vera eitt frálíkt umbíti.

– At tey bæði skifta um starv merkir, at vit nú í Føroyum fáa eitt fólk, ið kennir arbeiðið í ES innanífrá, meðan vit í Brússel fáa eitt fólk, ið kennir innanhýsis trupulleikarnir í Føroyum. Hetta kann verða ein stórur fyrimunur, sigur Herluf Sigvaldsson.

Arbeiðið hjá Føroyska umboðsmanninum í Brússel er fevnir ógvuliga vítt. Hann skal arbeiða víðari við Føroyska handilssáttmálanum við ES, sum partarnir í løtuni eru við at víðka. Eisini skal umboðsmaðurin taka sær av ymiskum málum, ið hava samband við ES og Føroyar. Umframt hetta stendur føroyski umboðsmaðurin í Brússel øllum føroyingum til taks.

Lesið eisini Sosialin á Internetinum
www.sosialurin.fo

# Poul Nielson vitjar

*Í hesum døgum vitjar danski ES-kommiserurin, Poul Nielson, løgmann. Hann skal kunna seg um føroyskt vinnulív og viðurskifti Føroya við ES*

JOHN JOHANNESSEN

Í gjár klokkan hálvgum tvey hittust løgmaður og danski ES-kommiserurin fyri menning og neyðhjálp, Poul Nielson, til ábit í Tinganesi.

Poul Nielson er komin til Føroya á kunningarferð, eftir at løgmaður seinasta summar beyð honum at kona á vitjan.

Á ferðini í Føroyum skal danski ES-kommiserurin kunna seg um føroyskt vinnulív og viðurskifti Føroya við ES. Poul Nielson skal í hesum sambandi, saman við ferðalagi sínum, vitja Havsbrún í Fuglafirði, rækjuvirkið á Oyri og Royndarstøðina í Kollafirði. Harafturat skal danski ES-kommiserurin vitja á Fróðskaparsetrinum og í Kirkjubø.

Í gjár hevði Poul Nielson fund við landsstýrið og síðani við uttanlandsnevndina. í gjárkvøldið beyð løgmaður honum við fylgi til døgurða á Hotel Hafnia.

Saman við Poul Nielson í Føroyum eru konan, Anne-Marie Nielson, og Claus Haugaard Sørensen, skrivstovustjóri.

